INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

KOMIÐ
2 8 APR. 2009
Landsgrannskoðanin

Løgtingsgrannskoðararnar
Traðagøta 43
Postrúm 2053
165 Argir

23. apríl 2009
Mál: 1307-023/07-10
Tygara skriv: 27. mars 2009
Viðgjørt: AE

**Viðvíkjandi frágreiðing um Tyrlutænastuna**

Víst verður til skriv frá Løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 27. mars 2009, við frágreiðing um Tyrlutænastuna.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum umsitur Strandfaraskip landsins sum málsøki, og varðar tí av sáttmálanum millum Strandfaraskip landsins (Vinnumálaráðið) og P/F Atlantsflog um flúgving millum oyggjarnar við tyrlu.

Innlendismálaráðið hevur tí lagt frágreiðingina til Vinnumálaráðið til avgreiðslu. Viðmerkjast kann, at Strandfaraskip Landsins hevur uppsagt sáttmálan við P/F Atlantsflog um innanoyggja flúgvingina.

Løgtingsgrannskoðararnir vísa á, at tað kann ganga ov long tíð at fáa svar frá aðalráðnum. Innlendismálaráðið hevur sett sær fyri at raðfesta hetta frammaliga, soleiðis at øll skriv frá Landsgrannskoðanini, so vítt tað yvirhøvur ber til, verða svaraði til tíðina.

Innlendismálaráðsins vegna

Atli Eiriksson
fíggjarráðgevi